# Ólavsøkukonsert í hja

## Ólavsøkukonsertin skal ikki longur goymast burtur í einum skúlagarði, staðfestir nýggi formaðurin í FUTT, sum nú flytur konsertina oman í hugnaliga umhvørvið í Tórsgøtu



*Jóhannus á Rógvu Joensen er nýggi formaðurin í FUTT. Eitt av hansara fyrstu átøkum er at endurskapa felagið og dagføra ólavsøkukonsertina soleiðis, at hon fær betri umstøður*

Ólavsøkukonsertin, soleiðis sum vit kenna hana, er næstan ikki til at kenna aftur. Hvørki plaseringin, tíðspunktið ella fyriskipanin av henni. Kommunuskúlagarðurin, sum hevur verið karmur um konsertina, so leingi man minnist, er boykottaður, og nú vera tað hugnaligu umstøðurnar í Tórsgøtu, ið skulu hýsa konsertini. Dagfestingin »27. juli«, sum man hava brent seg fasta hjá teimum flestu sum ólavsøku-konsert-dagin, sleppur eisini at bróta seg út úr ásettu boksini, og er tað í ár tann 25. juli, ið er valdur til hetta annars so siðbundna tiltak.

### Umstøðurnar eru hugnaligari

– Vit hava valt at flutt stað, tí at vit meta, at tíðin er farin frá kommunu-skúlagarðinum. Fakta er, at har er ov óinterissant at hava eina slíka konsert, og tað vilja vit broyta, sigur nýggi formaðurin í FUTT, Jóhannus á Rógvu Joensen.

– Vit ynskja at byrja umaftur og gera nakað nýtt; millum annað við at fara til eitt øki, sum er hugnaligari og gevur eitt betri huglag. Tað hevur eisini verið ov nógvur klandur uppi í spælinum tey seinastu árini millum ítróttarfeløg og ólavsøkukonsertina, umframt tað at grannarnir har uppi hava verið misnøgdir við óskil, full fólk, sum gera ónáðir og so framvegis. Hesum tingunum sleppa vit undan niðri á Tórsgøtu. Yvirhøvur meta vit, at tað hevur stóran týdning, at eitt slíkt tiltak ikki verður goymt burtur men hendir mitt í býnum, har sum fólkið er, og har sum umstøðurnar eru vinaligar og hugnaligar, sigur nýggi formaðurin.

– Tær góðu umstøðurnar á Tórsgøtu eru bara ein av fleiri fyrimunum við at flyta konsertina oman har. Nakað annað er so tað, at vit fáa nógv fleiri møguleikar, til dømis við at gera ein pall afturat. Høvuðspallurin verður á parkeringsplássinum niðri við Hotel Tórshavn, har bólkar sum Lena og Niclas, Bet You Are William, Hanus Johansen við bólki, Páll Finnur Páll, 200, SIC og Synarchy skulu spæla. Afturat tí verður eisini ein intimpallur inni í Tjóðpallinum, har vit m.a hava sett Eager to Please, Martin Joensen, Brand Enni, Katla, DJ'ing og jazztónleik

**ÓLAVSØKUKONSERTIN**
**verður á Tórsgøtu tann 25. juli klokkan 19.00**

**SKRÁIN HIGARTIL**
**Lena og Niclas**
**Eager to Please**
**Bet you are William**
**Hanus Johansen við bólki**
**Páll Finnur Páll**
**200**
**Synarchy**
**Martin Joensen**
**Brandur Enni**
**SIC**
**DJ Pete Switch**
**Katla**




*Ólavsøkukonsertin, sum seinastu árini hevur verið í Kommunuskúlagarðinum tann 27. juli, er nú flutt oman á Tórsgøtu og verður ístaðin 25. juli*